# SÁLARFRØÐILIGUR FAKFESTIVALUR
2012





# SÁLARFRØÐILIGUR FAKFESTIVALUR 2012

**22.-23. mars**

**Góði festivalgestur,**
Vælkomin á Sálarfrøðiliga fakfestivalin 2012! Hetta er annað árið á rað, at hetta tiltak fer av bakkastokki, og skráin er sera fjølbroytt.

Sálarfrøðingurin George Miller tók einaferð til orðanna, at "psychology is an intellectual zoo". Tí eins og fleiri aðrar vísindaligar greinar er sálarfrøðin sera samansett og tvítýdd. Objektið, sum sálarfrøðin eygleiðir, mátar og vigar, er jú menniskjað. Menniskjað sum einstaklingur og í bólki. Menniskjað sum barn og sum ungdómur. Menniskjað við tess sálarórógvi, og menniskjað við tess sunnu, skapandi førleikum.

Alt hetta er í fokus í sálarfrøðiligu vísindagreinini. Tað er avbjóðandi at granska og arbeiða við hesum, tí hvørt einstakt menniskjað hevur tess individuellu eyðkenni, samstundis sum tað hevur nakað til felags við øll onnur menniskju. Einfaldar niðurstøður røkka ikki langt, og neyðugt er at tola og tíma andsagnir og margfeldni.

Eins og í fjør lýsir festivalurin í ár hetta margfeldni í síni skrá.

So vælkomin í ein intellektuellan djóragarð! Vónandi verður hetta ein vitskuvíðkandi og stimbrandi uppliving fyri teg!

**Súsanna O. Skaale**
**Cand.psych.aut.**
Forkvinna í stýrisbólkinum
fyri fakfestivalin

# Um skránna

Fakfestivalurin í ár er samansettur av 28 verkstovum/fyrilestrum - 4 teirra eru heilar dagar og 24 hálvar dagar - veitarar eru 31 føroyskir sálarfrøðingar burturi og heima.

Byrjað verður báðar dagar við morgunmati og felags gestafyrilestri, áðrenn tær mongu verkstovurnar fara í gongd.

Fakfestivalurin verður hildin á Hotel Føroyum, tó eru nakrar verkstovur í Norðurlandahúsinum. Bussar flyta luttakarar millum Hotell Føroyar og Norðurlandahúsið.

Vit vóna, at tað eydnast tær at raðfesta verkstovur, so tú fært sett saman eina festival-skrá, sum hóskar júst til tíni ynski og tín tørv.

Sí undir tilmelding hvussu tú skrásetur teg til hesar verkstovur.

# Tilmelding

Tilmelding og gjald fyri luttøku á Sálarfrøðiliga Fakfestivalinum 2012, sum verður 22.-23. mars, fer fram á **www.psykolog.fo**. Her velur tú fyrst hvørjum verkstovum tú vilt luttaka í teir tveir dagarnar, og síðani rindar tú við gjaldskorti. Ymisk mørk eru fyri, hvussu nógv kunnu luttaka á teimum ymisku verkstovunum – so skunda tær, um tú vil vera vís/vísur í at fáa tey pláss, ið tú helst vilt hava.

Umframt luttøku á 4 verkstovum umfatar gjaldið morgunmat, kaffi fyrrapart og seinnapart, døgurða og um neyðugt buss millum Hotel Føroyar og Norðurlandahúsið.

**Kostnaðurin fyri luttøku er kr. 3.750,- Tekna tit tvey ella fleiri starvsfólk frá sama arbeiðsplássi er kostnaðurin bert kr. 3.250,- fyri hvørt starvsfólk.**






# HEILSUGÓÐUR FUNDARPAKKI 2012

## MORGUN

Kaffi/te, grovbollar, rugbreyð, soltnir ostar, bónda skinka og nýpressað djús

## MIÐMÁLI

Sunnur talerkur við vistfrøðiligari saft og kalt green tea við ginseng

## SEINNAPART

Kaffi/te, frukt terta og orkuríkur smoothie

## Í HØLINUM ALLAN DAGIN

Niðurskorin frukt, smáðir hapsar við dipp, nøtu og rosinu skál til hvønn luttakara og ísvatn

---

# Verkstovur og fyrilestrar

## Hósdag fyrrapart

09.45 - 12.15

### 1 Hvussu gongur tú um starvsfelagar, ið eru nærum ómøguligir at arbeiða saman við?

Suni Poulsen

Tema sum samanhald, mentan, samskifti og virðir fylla aloftast nógv í arbeiðinum við stovns- og leiðslumenning. Men hvat við tí meira myrku síðuni? At tað á nógvum arbeiðsplássum finnast fólk við eyðkennum frá psykopati og narcissismu. At starvsfelagar fylla ov nógv við teirra kenslum og gerast "drama-queens", í meðan aðrir skapa ørkymlan, tí teir vísa ov lítið av kenslum.

### 2 Sálarløstur (trauma), tilbúgving og viðgerð av sálarløstum

Katrina L. Holm, Heri Kragesteen, Kári Leivsson og Jegvan Bæk

Hvussu elva ógvusligar upplivingar til sálarløst? Hvat kunnu arbeiðspláss og skipanir, almennar og privatar, gera fyri starvsfólk og avvarðandi, tá kreppa rakar tey ella skipanina? Hvat ber til at gera, um sálarløstur ger vart við seg hjá tí einstaka eftir stutta tíð ella sum eyðkenni seinni (t.d. PTSD)?

Allan dagin 09.45 - 15.45

## 3 Metakognitiv terapi mótvegis depressión

Kristian E. Andersen

Metakognitiv terapi er ein nýggjur, innovativur og serstakliga effektivur sálarfrøðiligur viðgerðarháttur mótvegis ymiskum sálarórógvi. Á hesi verkstovuni fer Kristian at leggja eina case fram, har hann m.a. við video-upptøkum vísir, hvussu metakognitiv terapi hjálpir einum sjúklingi við depressión at gevast við yvir-hugsan og at styrkja síni evni at halda fokus.

**Allan dagin 09.45 - 15.45**

## 4 Menning av refleksivum toymissamstarvi

Erla Højsted

Henda verkstovan bjóðar eitt refleksiónsforum við undirvísing og venjingum at menna samstarv og analysu- og problemloysingarstrategiir. Arbeiðshátturin hevur serliga góðar royndir í sambandi við menning av námsfrøðiligum arbeiði innan dagstovnar, skúlar og viðgerðarstovnar, men kann eisini brúkast til nærum alla starvsfólkamenning.

## 5 Fokus á Locus of Control

Annbjørg Abrahamsen

Mátin at handfara støður avger, um støðan elvir til strongd. Fyrilestur um strongd og venjingar har luttakarin lærir at síggja møguleikar fyri at ávirka gerandisdagin, og fær amboð til at fyribyrgja strongd.

## 6 Hví spæla børn?

Magnus Dahl

Ein kann undrast á tann eldhuga og orku, ið 3-6 ára gomul børn leggja í teirra spælivirksemi. Hvønn týdning hevur spælið fyri menningina hjá børnunum, og mennast í spælinum ávís evni og førleikar, sum ikki kunnu mennast uttan fyri spælivirksemi? Hvørjar tilgongdir kunnu pedagogar hava til spæl í barnagarðinum?

## 7 Ungdómspsykiatri: Útgreining, diagnostisering og viðgerð

Høgni Kragesteen

Við støði í ítøkiligum dømum, sálarfrøðiligum kanningum og ICD -10 verður ljós varpað á sálarórógv s.s. skizofreni, depressión / mani, angist, persónleikatrupulleikar og menningaróløg m.a. autismu og ADHD. Komið verður eisini inn á sálarfrøðiligar viðgerðarhættir s.s. kognitiva atferðarterapi, tilknýtisbaseraða dynamiska terapi, mentaliseringsterapi og mindsight.

## 8 Órólig og ófriðarlig børn

Magnus Hansen

Í skúlanum eru børn, sum eru rættiliga strævin hjá lærarum at hava í einum vanligum skúlaflokki. Hvussu hjálpa vit nøkrum av hesum børnum og lærarum at fáa nakað burtur úr skúlagongdini?

# Hósdag seinnapart

13.15 - 15.45

## 9 At handfara strongd á arbeiðsplássinum

Marita Mortensen

Strongd vísir seg á øllum stigum á arbeiðsplássinum – hjá tí einstaka, á deildum, og á arbeiðsplássinum sum heild. Hvussu kunnu vit hvør sær og saman handfara og fyribyrgja strongd? Og hvønn leiklut hevur leiðslan í arbeiðinum við at fyribyrgja strongd?

## 10 Torførar kensluligar reaktiónir í hjálpararbeiðinum

Alberta McLeod

Verkstovan tekur støði í teimum torføru kensluligu reaktiónunum, sum hjálparin kann uppliva í arbeiðinum við ungum, ið hava álvarsamar trupulleikar. Verkstovan vendir sær til teirra, sum dagliga arbeiða við ungum.

## 11 Empati - lederens arbejdsredskab nr. 1

Jan Willemoes

Hvordan skaber du det på én gang hjælpsomme og udfordrende samtalerum, hvor "den anden" bliver mødt i egen virkelighed? Hvordan bliver empatien et arbejdsredskab frem for en forurening?

## 12 Tað skitna, vasuta, stygga og ilska barnið - okkara ábyrgd!

Hans Mourits Foldbo, Oddbjørg Balle og Signhild Johannesen

Í skúla, á dagstovni og aðra staðni sæst tíðum barnið, ið mistrívist. Mistrivnaðurin hevur ymisk andlit, men okkara ábyrgd er tann sama - at síggja og hoyra barnið, siga frá og at veita hjálp.

## 13 Skiftisbørn

Hanna Kampmann

Hugleiðingar í sambandi við nýggja kanning av børnum, sum skiftast ímillum at búgva hjá mammu og pápa sínum.

## 14 ADHD ein sosial konstruktión

Anna Eikholm

Seinastu árini hevur sjúkugreiningin ADHD verið so umfatandi, at mong hava set spurnatekin við, hvørt ADHD er ein avleiðing av nútíðarsamfelagnum – heldur enn at vera ein nevrologisk sjúka. Við støði í umfatandi vísundaligum kanningum verður ADHD sjúkugreiningin viðgjørd.

# Fríggjadag fyrrapart

## 09.30 - 12.00

### 15 Tilveruspurningar á arbeiðsplássinum

Maibritt Højgaard

Eksistentiel psykologi – ella sálarfrøðin um tilverunnar stóru spurningar um lívið, deyðan og meining – er kropin inn í okkara arbeiðslív. Verkstovan setir sjóneykuna á, hvussu tílíkir persónligir og privatir spurningar kunnu fáa eitt pláss í fyritøkum og á arbeiðsplássum m.a. í sambandi við leiðslumenning.

### 16 Mindfulness – ogna tær amboð at handfara strongd

Súsanna O. Skaale og Kristian E. Andersen

Kennir tú strongd í gerandisdegnum? Kennir tú at dagarnir fara framvið, uttan at tú gevur tær far um tað? At tú livir uttan veruliga at vera til staðar? Við mindfulness lærir tú at vera til staðar í nú'inum og at handfara strongd.

### 17 Kveiking og menning við supervisión

Anna D. Hentze og Ásvør Skaalum

Fært tú brúkt tínar persónligu og fakligu førleikar í arbeiðinum? Virkar starvsfólkabólkurin nóg væl? Hendan verkstovan varpar ljós á, hvussu tú við reflekterandi supervisión kanst mennast, tá tú heldur, at tú ikki strekkir til, er ørkymlað og fastlæst. Endamálið við verkstovuni er við undirvísing og venjingum at vísa á, hvussu tú bæði sum persónur og starvsfólkabólkur kanst mennast til at brúka tann goymda persónliga og fakliga førningin og í gjøgnum supervisión at finna nýggjar hættir at grunda yvir og loysa avbjóðingar í arbeiðinum.

**Allan dagin 09.30 - 15.15**

## 18 Ørskaparins megi

Tóra Petersen og Rigmor N. Arge

Hvussu kunnu vit skilja tey ávirkanarfyribrigdi, ið henda millum menniskju. Ætlað starvsfólki, ið arbeiða við og um fólk. Vit venja interna supervisión. Virkin luttøka.

**Allan dagin 09.30 - 15.15**

## 19 Lesing og lesitrupulleikar - Fyribyrging og ábøtur

Ása Ellefsen

Greitt verður frá ymiskum ástøði um lesing, lesitrupulleikar og gransking á økinum.

## 20 Tey góðu barnaár

Marjun Nielsen

Hvat er tað, ið avger, um barnaárini verða góð ella ring, og ber til at hjálpa teimum familjum, ið ikki fáa tað at rigga?

## 21 Sjálvsvirðing og sjálvsálit hjá leiðarum og arbeiðsfólki

Jegvan Bæk

Sjálvsvirðing og sjálvsálit eru ikki alt, men næstan einki er nakað vert uttan. Verkstovan snýr seg um ein einfaldan hátt at betra sína sjálvsvirðing og sítt sjálvsálit, soleiðis at leiðarar hava tað lættari við truplum avgerðum, støðum og kundum, at starvsfólk tora betur, og at leiðarar og starvsfólk gerast betri at handfara strongd.

## 22 Avbjóðandi atburður

Rannvá Biskupstø

Hvussu kunnu foreldur og fakfólk rúma avbjóðandi atburði, soleiðis at barnið/tann ungi búnast og kann menna ein sunnan persónleika. Hetta er ein verkstova, har fólk kunnu reflektera saman, eftir at eg havi havt framløgu um hugtakið: Avbjóðandi atburður.

# Fríggjadag seinnapart

**13.00 - 15.15**

## 23 Angist skal basast við angist

Anna Elisabeth Iversen

Angist er ein tann vanligasti sálarligi trupulleikin millum børn og ung. Nógv av hesum børnum koma tó ongantíð í viðgerð fyri trupulleikan. Framløgan snýr seg um viðgerð av angist hjá børnum við støði í kognitivari atferðarterapi. Eisini verður leikluturin hjá foreldrum í viðgerðini lýstur.

## 24 Betra um parlagið

Kristian E. Andersen og Súsanna O. Skaale

Hvussu kunnu eg og maki mín kveikja kærleika og nøgdsemi við hvønn annan? Hvussu kann eg gerast ein betri maki? Hvussu kunnu vit læra at handfara truplar tankar og kenslur, ið knýta seg at parlagnum? Henda verkstovan er ætlað øllum - støkum eins væl og fólki í parlagi - ið vilja ogna sær feskastu amboðini innan sálarfrøðina at styrkja um parlagið.

## 25 Værdigheden i afskeden

Jan Willemoes

Hvad er præmisserne for "den gode opsigelse"? Kan du ved afskedigelse skabe et bevægelsesrum for den opsagte, så et tab forvandles til bevægelse og udvikling? Hvordan kan du bevare værdigheden i afskeden?

## 26 Hard-core meditatión

Suni Poulsen

Áhugin fyri fyribrigdum frá eystri vinna alt meira fram í vesturlondum – t.d. meditatión og yoga. Hesir teknikkir verða í vesturlondum aloftast flættaðir inn í okkara hugsunarhátt um tilveruna við stórum vanda fyri at misskilja, hvat upprunaliga meiningin er. Hugtøk og tankagongd aftan fyri meditatión-traditiónina Zazen verða gjøgnumgingin og samanborin við modernaða psykologi. Endað verður við demonstratión av meditatións-teknikki.

## 27 Sálarfrøðingar í tí almenna

Jonna Pólsdóttir Houen

Hvussu kann ein sálarfrøðingur vera við til at hjálpa sjúkrameldaðum borgarum áfram? Hetta er ein verkstova við praktiskum 'cases' - dømisøgum um, hvussu sálarfrøðiligt arbeiði hóskar við og gerst partur av tí almenna átakinum at hjálpa sjúkrameldaðum aftur á arbeiðsmarknaðin.

## 28 Viðgerð av etingarólagi

Annika Helgadóttir

Hvussu kann ein viðgerð av etingarólagi best skipast við sjúklinginum og teim avvarðandi í miðdepli? Evnið verður lýst gjøgnum gransking, ástøði og praktisk dømi.

# Gestarøðarar

## Heini í Skorini

hevur seinastu árini verið virkin í almenna rúminum, bæði sum sjónvarpsvertur, journalistur og viðmerkjari. Heini er útbúgvin BA í stjórnmálafrøði og MA í religiónsvísindi. Hann hevur búð og lisið í Keypmannahavn, London, Ísrael og Suðurafrika. Í dag býr Heini í Tórshavn og starvast sum freelance-journalistur fyri m.a. donsku Weekendavísina og dokumentardeildina hjá Kringvarpinum.

## Karin Kjølbro

er kend fyri sítt politiska arbeiði sum løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin, fyrrverandi blaðstjóri og drúgva virksemi sum sosialráðgevi. Umframt hetta hevur Karin eisini verið rættiliga virkin í Mettustovu. Í dag býr Karin í Tórshavn og er leiðari fyri Kriminalforsorgina.

Cand.psych. **Alberta McLeod, FO;** Cand.psych., Spec.clin.psych. **Anna Debes Hentze, FO;** Cand.psych. **Anna Eikhólm Joensen, FO;** Cand.psych.aut. **Anna Elisabeth Iversen, DK;** MSc.occ. psych. **Annbjørg Abrahamsen, FO;** Cand.psych.aut. **Annika Helgadóttir Davidsen, DK;** Cand.pæd.psych. **Ása Ellefsen, FO;** Cand.psych.aut. **Ásvør Skaalum, FO;** Cand.psych. **Erla Højsted, DK;** Cand.pæd.psych.aut. **Hanna Kampmann, FO;** Cand.pæd.psych. **Hans Mourits Foldbo, FO;** Cand.psych.aut. **Heri Kragesteen, FO;** Cand.psych.aut. **Høgni Kragesteen, DK;** Cand.psych.aut. et Cand.merc. **Jan Willemoes, FO;** Cand.psych. aut. **Jegvan Zacharias Bæk, FO;** Cand.psych. **Jonna Pólsdóttir Houen, DK;** Cand.pæd.psych.aut. **Kathrina Lindenskov Holm, FO;** Cand.psych., Spec.clin.psych. **Kári Leivsson, FO;** Cand. psych. **Kristian Eli Andersen, DK;** Cand.psych. et Cand.scient. **Magnus Dahl, DK;** Cand.pæd.psych. **Magnus Hansen, FO;** Cand.psych. **Maibritt Højgaard, DK;** Cand.psych.aut. **Marita Mortensen, DK;** Cand.pæd.psych.aut. **Marjun Nielsen, FO;** Cand.pæd.psych.aut. **Oddbjørg Balle, FO;** Cand.psych.aut. **Rannvá Biskupstø, FO;** Cand.pæd.psych.aut. **Rigmor N. Arge, FO;** Cand.psych.aut. **Signhild Johannesen, FO;** Cand.psych. aut. **Suni Poulsen, DK;** Cand.psych.aut. **Súsanna O. Skaale, FO;** Cand.psych. **Tóra Petersen, FO.**

## Hósdagur:

**8.00 - 8.30**: Morgunmatur

**8.30 - 8.45**: Forkvinnan fyri fakfestivalin bjóðar vælkomin & Landsstýrisfólkið setur festivalin

**8.45 - 9.15**: Gestarøðari: Karin Kjølbro

**9.15 - 9.45**: Kaffi (& ferðing til NLH)

**9.45 - 12.15**: Verkstova/fyrilestur (150 minuttir)

**12.15 - 13.15**: Matarsteðgur (& ferðing til NLH)

**13.15 - 15.45**: Verkstova/fyrilestur (150 minuttir)

**15.45 - 16.00**: Ferðing frá NLH til Hotel Føroyar

(møguleiki fyri at fáa sær kaffisopa og køkur millum kl. 14.00 og 16.15 )

## Fríggjadagur:

**8.00 - 8.30**: Morgunmatur

**8.30 - 9.00**: Gestarøðari: Heini í Skorini

**9.00 - 9.30**: Kaffi (& ferðing til NLH)

**9.30 - 12.00**: Verkstova/fyrilestur (150 minuttir)

**12.00 - 13.00**: Matarsteðgur (& ferðing til NLH)

**13.00 - 15.15**: Verkstova/fyrilestur (135 minuttir)

**15.15 - 15.30**: Ferðing frá NLH til Hotel Føroyar

**15.30 - 16.00**: Formaður felagsins tekur samanum

(møguleiki fyri at fáa sær kaffisopa og køkur millum kl. 14.00 og 16.15 )

FØROYSKIR SÁLARFRØÐINGAR